Stjørna av sirklum


Hetta virksemið kann vera brúkt ímillum allar aldursbólkar, men støddfrøðiligi høvuðsdenturin eigur at verða lagdur soleiðis, at hann samsvarar aldrinum.

Nøkur møgulig evni eru:
- Sirkulin, radius, tvørmál og ummál.
- Brot.
- Vinklar.
- Symmetri og snaring.




Tilfar: Tunt litað pappír, passara, linjal, saks og lím.

Hvussu gera vit stjørnuna?
- Tekna ella konstruera tríggjar sirklar við sama radius á litað pappír.
- Klipp sirklarnar út.




- Boygg sirkul 1 í átta eins partar,
  sum myndin vísir.




- Klipp allar partarnar út.

- Líma so hesar partarnar á sirkul 2,
  sum víst á myndini niðanfyri,
  so tú fært eina stjørnu.





- Být triðja sirkulin í fleiri minni, eins partar, sum í tali eru fleiri enn átta. Klipp partarnar út.

- Líma eisini hesar partarnar (ella nakrar teirra) á sirkul 2. Royn og legg ymiskt symmetrisk mynstur áðrenn tú límar.



- Royn eisini at gera stjørnur
  í ymsum litum.





Uppskot til kanningar

- **Brot**
  Hvussu stórur partur av einum
  sirkli eru teir ymsu partarnir?

- **Symmetri**
  Hvussu nógvar symmetriásir eru
  í teimum ymsu stjørnunum?

- **Vinklar**
  Næmingarnir kunnu máta ymsar
  vinklar í skapunum.

  Heldur enn at renna eftir ávísum
  svarum, eiga at verða settir spurningar,
  sum eru merktir av, at hetta er leitandi,
  kannandi virksemi.

  Hvat hevði t.d. hent, um sirkulin
  høgrumegin varð býttur í 12, heldur
  enn átta partar.

